**Semja**

**millum**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**Maskinmeistarafelagið**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at leingja sínamillum sáttmálan til 1. juni 2024 við niðanfyri standandi broytingum:

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. juni 2022 hækkar lønin | 3,80 % |
| 1. juni 2023 hækkar lønin | 4,04 % |

2. Grein 2, stk. 1 verður soljóðandi:

*"Stk. 1. Leiðaraviðbót. Verður maskinmeistari settur í starv, sum til arbeiði, fyrisiting, dugleika ella annað hevur slíka serstøðu, at tær vanligu fyritreytir fyri niðanfyri nevndu lønir o.a.m. ikki hava gildi her, eiga partarnir sínámillum at gera seravtalur um viðbøtur at lønini og møguligar aðrar treytir. Er talan um maskinmeistara ber til heldur at seta hann inn á eitt av stigunum í lønartalvuni, sum eru ætlað maskinmeistarum í deildarleiðara- ella leiðarastarvi. Maskinmeistari settur inn á lønarstig 23 – 28 hækkar ikki á lønarstiganum sambært starvsaldri."*

Lønartalvan verður broytt samsvarandi.

- Stig 23 er lønin á stig 22 + 1.150
- Stig 24 er lønin á stig 23 + 650
- Stig 25 er lønin á stig 24 + 650
- Stig 26 er lønin á stig 25 + 650
- Stig 27 er lønin á stig 26 + 650
- Stig 28 er lønin á stig 27 + 650

Lønarhækkingar verða roknaðar inn á lønarstigini 1 – 22. Stig 23 – 28 verða roknað út frá lønini á stig 22.

Nýggja lønartalvan er viðheft í fylgiskjali 1.

3. Í grein 7, stk.3 um yvirtíðargjald verður hesin setningurin strikaður:

   *"Yvirtíðargjaldið verður latið fyri hvønn byrjaðan tíma."*

   Ístaðin verður sett inn:

   *"Um so er, at starvsfólkið, eftir at vanliga arbeiðstíðin er lokin, verður boðsent aftur til arbeiðis, er yvirtíðargjaldið minst 1 tími. Hetta er tó ikki galdandi, um viðkomandi fær viðbót sambært § 2, stk. 2."*

4. Grein 12, stk. 1 verður broytt at ljóða soleiðis:
   *"Arbeiðsgevarin rindar 15% av galdandi mánaðarløn, heruppií viðbøtur, í eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan."*

5. Í grein 16, stk. 1 verða *"5 arbeiðsdagar"* broyttir til *"3 arbeiðsdagar"*.

6. Grein 18 fær nýtt heiti: *Ser- og eginavtalur*

   Harumframt verður orðað eitt nýtt stk. 3:

   *"Til ber at gera eginavtalu millum arbeiðsgevara og einstaka maskinmeistaran. Treytin fyri slíkari eginavtalu er:*

   - *At grundreglurnar eru tær somu sum í høvuðssáttmálanum.*
   - *At avtalan, ið verður gjørd, samanlagt ikki er verri enn høvuðssáttmálin.*
   - *At limagjaldið til Maskinmeistarafelagið til eina og hvørja tíð fylgir tí, sum er ásett í høvuðssáttmálanum.*
   - *Um maskinmeistari ynskir at ráðføra seg við yrkisfelag sítt um avtaluna ella broytingar í henni, skal hann hava høvi til tess. Yrkisfelagið hevur tagnaðarskyldu um øll viðurskifti í avtaluni."*
   - *At avtalan kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða freist.*

7. § 21. Gildi sáttmálans

"*1. juni 2020*" verður broytt til "*1. juni 2022*", og "*1. juni 2022*" verður broytt til "*1. juni 2024*".

**Tórshavn, 17. juni 2022**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Jórun Gardar, samráðingarleiðari

Høgni Hansen, næstformaður

**Fyri Maskinmeistarafelagið**

Ólavur Gunnarsson, formaður

Regin Olsen, næstformaður

Ólavur Østerø, nevndarlimur

Fylgiskjal 1

# Lønartalva fyri maskinmeistarar í privatari tænastu á landi

**1. juni 2021**

| | Stig | Mánaðarløn 01-jun-21 | Eftirløn 01-jun-21 15,00% | Tímaløn 07.00-17.00 | Úrtíðarløn 17.00-21.00 40% | Úrtíðarløn 21.00-24.00 60% | Úrtíðarløn 24.00-07.00 100% |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | kr 26.743,99 | kr 4.011,60 | kr 154,59 | kr 216,43 | kr 247,34 | kr 309,18 |
| | 2 | kr 27.217,52 | kr 4.082,63 | kr 157,33 | kr 220,26 | kr 251,72 | kr 314,65 |
| | 3 | kr 27.691,06 | kr 4.153,66 | kr 160,06 | kr 224,09 | kr 256,10 | kr 320,13 |
| | 4 | kr 28.164,59 | kr 4.224,69 | kr 162,80 | kr 227,92 | kr 260,48 | kr 325,60 |
| | 5 | kr 28.639,65 | kr 4.295,95 | kr 165,55 | kr 231,77 | kr 264,88 | kr 331,09 |
| | 6 | kr 29.113,19 | kr 4.366,98 | kr 168,28 | kr 235,60 | kr 269,25 | kr 336,57 |
| | 7 | kr 29.586,72 | kr 4.438,01 | kr 171,02 | kr 239,43 | kr 273,63 | kr 342,04 |
| | 8 | kr 30.061,78 | kr 4.509,27 | kr 173,77 | kr 243,27 | kr 278,03 | kr 347,54 |
| | 9 | kr 30.536,85 | kr 4.580,53 | kr 176,51 | kr 247,12 | kr 282,42 | kr 353,03 |
| | 10 | kr 31.011,91 | kr 4.651,79 | kr 179,26 | kr 250,96 | kr 286,82 | kr 358,52 |
| | 11 | kr 31.483,91 | kr 4.722,59 | kr 181,99 | kr 254,78 | kr 291,18 | kr 363,98 |
| | 12 | kr 31.958,98 | kr 4.793,85 | kr 184,73 | kr 258,63 | kr 295,57 | kr 369,47 |
| | 13 | kr 32.434,04 | kr 4.865,11 | kr 187,48 | kr 262,47 | kr 299,97 | kr 374,96 |
| | 14 | kr 32.909,11 | kr 4.936,37 | kr 190,23 | kr 266,32 | kr 304,36 | kr 380,45 |
| | 15 | kr 33.381,11 | kr 5.007,17 | kr 192,95 | kr 270,14 | kr 308,73 | kr 385,91 |
| | 16 | kr 33.856,17 | kr 5.078,43 | kr 195,70 | kr 273,98 | kr 313,12 | kr 391,40 |
| | 17 | kr 34.331,24 | kr 5.149,69 | kr 198,45 | kr 277,83 | kr 317,51 | kr 396,89 |
| | 18 | kr 34.806,31 | kr 5.220,95 | kr 201,19 | kr 281,67 | kr 321,91 | kr 402,39 |
| | 19 | kr 35.279,84 | kr 5.291,98 | kr 203,93 | kr 285,50 | kr 326,29 | kr 407,86 |
| | 20 | kr 35.753,37 | kr 5.363,01 | kr 206,67 | kr 289,33 | kr 330,67 | kr 413,33 |
| | 21 | kr 36.228,44 | kr 5.434,27 | kr 209,41 | kr 293,18 | kr 335,06 | kr 418,83 |
| | 22 | kr 36.701,97 | kr 5.505,30 | kr 212,15 | kr 297,01 | kr 339,44 | kr 424,30 |
| Deildarleiðara- og leiðarastørv | 23 | kr 37.851,97 | kr 5.677,80 | kr 218,80 | kr 306,32 | kr 350,08 | kr 437,60 |
| | 24 | kr 38.501,97 | kr 5.775,30 | kr 222,55 | kr 311,58 | kr 356,09 | kr 445,11 |
| | 25 | kr 39.151,97 | kr 5.872,80 | kr 226,31 | kr 316,84 | kr 362,10 | kr 452,62 |
| | 26 | kr 39.801,97 | kr 5.970,30 | kr 230,07 | kr 322,10 | kr 368,11 | kr 460,14 |
| | 27 | kr 40.451,97 | kr 6.067,80 | kr 233,83 | kr 327,36 | kr 374,12 | kr 467,65 |
| | 28 | kr 41.101,97 | kr 6.165,30 | kr 237,58 | kr 332,62 | kr 380,13 | kr 475,17 |

Maskinistar verða løntir á stig 1 - 8
Maskinmeistarar, við 2 ára útbúgving, verða løntir á stig 7 - 15
Maskinmeistarar verða løntir á stig 13 - 22
Maskinmeistarar í deildarleiðara- og leiðarastørvum kunnu verða settir inn á stig 23 - 28
Maskinmeistari settur inn á lønarstig 23 - 28 verður ikki fluttur upp á lønarstiganum

| Viðbót samb. § 2, stk 3 | |
|---|---|
| Viðbót | kr 1.150,00 |
| Millum fylgjandi trin | kr 650,00 |

| Tilkallivakt samb. § 7, stk. 6 | |
|---|---|
| Vaktargjald I | kr 24,42 |
| Vaktargjald II | kr 48,84 |

| Tunnilsviðbót |
|---|
| 9,35 % av viðkomandi lønarstigi |